**GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.**
**NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI**

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

**Danstein**
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo

Sosialurin - 311820



**Hotel Føroyar**
Tlf. 317500
Hotellið við útsýninum

Best Western

Fríggjakvøldið 20. & leygarkvøldið 21. apríl frá kl. 18.00

**BÚFFKVØLD VIÐ SALATBARR**

áðrenn "aftur í 60'ini"

tveir rættir 145,-

**Borð kann bíleggjast á tel. 31 75 00**

Sosialurin - 311820


# Keyp myndir

Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum



Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:

| | |
|---|---|
| 10x15 cm. kr. 80,- | 18x24 cm. kr. 150,- |
| 13x18 cm. kr. 100,- | 20x30 cm. kr. 200,- |
| 15x21 cm. kr. 130,- | 30x45 cm. kr. 350,- |

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Blað nr.: ______
Síða: ______
Støddi: ______
Mongd: ______

Navn: ______
Bústaður: ______
______
Telefon: ______


**Norðurlandahúsið í Føroyum**

Sí SVF tekstvarp s. 650



**Sosialurin**
www.sosialurin.fo



GEVIÐ BLÓÐ


## Móttøka

Í samband við, at eg fylli 50 ár tórsdagin 19. apríl, verður móttøka í flokshølunum hjá Javnaðarflokkinum á Gamla Apoteki seinnapartin frá 16 til 18.

**Jóannes Eidesgaard**
løgtingsmaður


**SK**
Felagið fyri Skrivstovu-, kramba- og teknisk starvsfólk

Upplýsir um:
-sáttmálan
-starvsmannalógina
-frítíðarlógina o.a.

Gerist limir - so standa vit sterkari!

Tlf 316837 og 216837
Traðarvegur 20
Boks 1378
110 Tórshavn
skfelag@post.olivant.fo

Opið er soleiðis:
Mánadag - fríggjadag
9.00 - 12.00
13.00 - 16.00


# Starvsfólk til Føroya Tele

## Starvsfólk til Bókhaldið

Til okkara bókhald verður søkt eftir einum fólki at byrja 1. juni 2001 ella skjótast gjørligt.

Á bókhaldinum eru 8 starvsfólk. Høvuðsuppgávurnar á deildini eru umsiting av kreditorum, lønum, kassum og fíggjarbókhaldinum. Øll bókføringin er á Oracle Financials.

Tann, sum sett/-ur verður, má rokna við at luttaka í øllum uppgávum á deildini.

**Førleikar hjá umsøkjaranum**
Tú skal hava skrivstovu- ella líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á, at tú kann taka ábyrgd og arbeiða sjálvstøðugt.

**Tað er eisini ein fyrimunur at hava**
- førleika í EDV
- HH, viðkomandi merkonom- ella líknandi skeið
- góðan røkjuskap
- góð samstarvsevni

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum góðum, avbjóðandi og mennandi umhvørvi.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Tele og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar viðvíkjandi starvinum kunnu fáast við at ringja til Martin á Mýruni, deildarleiðara ella Heina Joensen, fíggjarstjóra á tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum viðmælum og CV skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. apríl 2001. Umsóknir skulu sendast til

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum
Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697



**Dansifrøi**

# Alment dansiskeið

## í Tórshavn vikuskiftið 20. og 21. apríl 2001

***Gerið tykkum klár til at fara aftur í 60-ini – lærið at dansa sama vikuskiftið.***
***Dansiskeið verður í auluni í Hoydølum og er fyri øll dansiáhugað – undirvísari er Anna Kirstin av Tvøroyri.***

Fyri børn og ung verður undirvíst í rock'n roll, linjudansi, rytmudansum, eingilskum dansi og dansispølum.

Byrjunarskeið verður fyri ung og vaksin, sum vilja læra at dansa, og fyri teimum, sum duga eitt sindur. Undirvíst verður í eingilskum dansi, rock'n roll og linjudansi.

Fyri vandar dansarar verður stílað fyri dansi-work-shop, har dansarar kunnu velja ímillum ymsar dansir, t.d. slow-fox, tango, sakta vals, rock'n roll og linjudans. Undirvíst verður í einum dansi í ein tíma, síðani einum øðrum dansi næsta tíman og so framvegis. Dansararnir kunnu á henda hátt melda seg til ein ella fleiri undirvísingartímar, alt eftir, hvat tey velja av dansum. Einasta treytin er, at tey duga grundtrinini í til dømis foxtrot og valsi.

**Fríggjadagin 20. apríl:**

| | | |
|---|---|---|
| Børn 7–10 ár | kl. 15.00–16.00 | |
| Børn 10–14 ár | kl. 16.15–17.30 | |
| Nýbyrjarar | kl. 18.00–19.30 | |
| Vandir | kl. 19.45–20.45 | Slow Fox |
| | kl. 21.00–22.00 | Rock'n roll og Linjudans |
| | kl. 22.15–23.15 | Sakta vals og Winervals |

**Leygardagin 21. apríl:**

| | | |
|---|---|---|
| Børn 7–10 ár | kl. 10.00–11.00 | |
| Børn 11–14 ár | kl. 11.15–12.30 | |
| Nýbyrjarar | kl. 13.00–14.30 | |
| Vandir | kl. 14.45–15.45 | Slow Fox |
| | kl. 16.00–17.00 | Rock'n roll |
| | kl. 17.15–18.15 | Linjudans |
| | kl. 18.30–19.30 | Sakta vals og Winervals |

**Kostnaður:**
kr. 75,00 fyri børn og ung
kr. 150,00 fyri nýbyrjarar
kr. 50,00 pr. dansitíma fyri vandar dansarar

**Tilmelding:**
á tlf. 317243, 316063, 316682 og 310634.

**Dansifrøi og Anna Kirstin**


**Uppsetan og skipan av barrum**

Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tilíkt

Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo

Sosialurin 311820


# Eldrafelag Føroya

kunngerð at ársfundur felagsins verður 4. mai kl. 12.00 á Hotel Hafnia. Skrá sambært lógina.

Allir limir kunnu møta, men mugu tekna seg hjá sínum lokalfelag áðrenn 1. mai.

**Nevndin**

FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ
**Føroya Gjaldstova**
Traðagøta 38, Postsmoga 2039, FO-165 Argir, Føroyar

## Søkt verður eftir hjálparfólki

### til EDV-deildina á gjaldstovuni

Ábyrgdarøkið verður at hjálpa kervisfyrisitanini at reka EDV-skipanirnar og hjálpa netfyrisitingini at knýta stovnar í EDV-skipanirnar hjá gjaldstovuni t.e. at leggja inn forrit og uppseta samskifti.

Seinni, sum evni og áhugi er til, verður arbeiðið meira avbjóðandi. Her verður hugsað um t.d. ábyrgd av ávísum uppgávum innan kervisfyrisiting og menning av loysnum.

Tær nýtist ikki nakra formliga ella ávísa útbúgving, men tó er tað ein avgjørdur fyrimunur at duga tey mest nýttu forritini sum office-pakkan og kenna til stýriskipanir. Eisini er gott, um tann, ið settur verður, hevur eitt sindur av skili fyri bókhaldi.

Upplæring fer fram við, at yvirtaka smáar lættari uppgávur frá kervisfyrisitingini, men sum frálíður, verða uppgávurnar størri og meira spennandi. Ein liður í útbúgvingini er ein innføring í virkisøkini á stovninum við tí endamáli at fáa yvirlit yvir funktiónir, arbeiðshættir og samskifti millum skipanir, soleiðis at tann, ið settur verður í tíðini fram til jólar skiftivís kemur at arbeiða á EDV-deildini og hinum deildunum á gjaldstovuni.

Umsóknir skulu vera Gjaldstovuni, Boks 2039, 165 Argir, í hendi innan 26. apríl 2001.

Fyrispurningar kunnu setast Dávi Johannesen á telefon 352400.


**Vit gera alt URTAGARÐSARBEIÐI**

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flísum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

**Fa. SÍMUN DALSGAARD**
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78


# Metaller købes

Jernbaneskinner + jernbanesveller sælges.

Henvendelse
**Leif Plougmann**
Tlf. 0045 40251787

# Ídnaðarbygningur í Trongisvági til sølu

Stoypivirki í Trongisvági til sølu um hóskandi boð fæst.

Bygningurin er 360 m².

**0045-98468867** ella **371558**

# Nordjobb

Ung millum 18 og 26 ár, ið hava hug at arbeiða í einum Norðurlandi í summar, kunnu nú søkja Nordjobb. Arbeitt verður í tíðarskeiðnum 15. mai til 15. september.

Nordjobb ávísir arbeiði, bústað og skipar fyri frítíðartiltøkum.

Freistin at søkja er úti 7. mai 2001.

Umsóknarbløð fáast á www.nordjobb.net og frá Arbeiðsloysisskipanini, Postsmoga 3022, 110 Tórshavn. tel. 349550 og fax 349551.

Nordjobb er norrøn verkætlan, sum norrønu feløgini í Føroyum, Danmark, Finnlandi, Grønlandi, Íslandi, Noregi, Svøríki og Álandi umsita. Norrøna Felagið í Føroyum heldur til í J. Patursonargøtu 24, 100 Tórshavn, tlf. 315319 og fax 3157245.

# Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20.
Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07.
Eisini ber til at senda teldupost til:
edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo



Sosialurin